## Skúlaforeldur hittast

Aðalfundur í foreldrafelagnum Heimi og skúla verður í Hoyvíkar skúla leygardagin 17. november. Endamálið við foreldrafelagnum er at styrkja samstarvið millum skúlaforeldur sum heild, soleiðis at tey fáa betri møguleikar til at vera við til at menna føroyska skúlan. Á fundinum fer Anna Dalsgarð, ráðgevi, at greiða frá týdninginum av, at børnini trívast í skúlanum, og hvussu vit steðga happing. Nevndin leggur fram ársfrágreiðing og uppskot til nýggja reglugerð fyri felagið. Kjakast verður um framtíðar mál hjá felagnum, og ein fimm-manna-nevnd at mynda felagið næsta árið.



## Námsfrøðilig ráðgeving

Av tí at kommunurnar hava fingið ábyrgdina av øllum børnum við serligum tørvi, hevur Klaksvíkar kommuna sett á stovn námsfrøðiliga ráðgeving. Ráðgevingin ber í sær, at foreldur at børnunum undir skúlaaldur og dagstovnar kunnu venda sær til haðar at fáa vegleiðing í at stimbra børnini málsliga. Hildið verður, at seks prosent av børnunum undir skúlaaldri hava serligan tørv – meiri ella minni. - Hetta samsvarar væl til tølini hjá okkum. Í løtuni hava vit eini 17 mál, sigur Jórun Niclasen, sum er sett í starv á námsfrøðiligu ráðgevingini. Hon er útbúgvin sernámsfrøðingur, skrivar Skúlablaðið.





*Tjóðveldiskvinnur framman fyri formannin í Sambandsflokkinum*

| | Fólkatingsval '05 | Kanning november 2007 | Í mun til seinasta val |
|---|---|---|---|
| **Fólkaflokkurin** | 24,0 | 21,7 | -2,3 |
| **Sambandsflokkurin** | 21,5 | 20,6 | -0,9 |
| **Javnaðarflokkurin** | 22,2 | 20,1 | -2,1 |
| **Sjálvstýrisflokkurin** | 2,4 | 3,3 | 1,0 |
| **Tjóveldi** | 25,4 | 25,6 | 0,2 |
| **Miðflokkurin** | 3,3 | 8,7 | 5,4 |
| **Hin stuttligi flokkurin** | 1,2 | 0,0 | -1,2 |
| **Tilsamans** | 100,0 | 100,0 | |

558 veljarar svaraðu í kanning, gjørd sunnudag 11. November

**Tá tey vórðu spurd um val av flokki, svaraðu**

- at tey ætlaðu at svara blankt 0,9 %
- at tey ikki ætlaðu at velja 6,1 %
- at tey høvdu ikki tikið støðu til hetta 13,4 %

Miðflokkurin er styrktur við Karsten Hansen úr Tjóðveldinum.

Karsten Hansen tykist vera eitt gott navn, tí hann fær dupult so nógvar atkvøður, sum Jenis av Rana. Karsten Hansen fær 42 prosent av atkvøðunum í Miðflokkinum, meðan Jenis av Rana fær 21 prosent. Triði maður á listanum, Bill Justinussen, fær 13 prosent av innanhýsis atkvøðunum hjá Miðflokkinum.

Innanhýsis býtið hjá Sjálvsstýrisflokkinum er púra javnt millum listan og báðar menninar á listanum við 31 prosentum til hvønn, meðan Rúna Sivertsen einans fær 7 prosent.

### Hørð innanhýsis kapping

Kappingin um annað plássi innanhýsis í flokkunum er eisini áhugaverd, tí møguleiki er, at fremsta valevnið sigur sessin frá sær fyri heldur at taka við einum løgmans- ella landsstýrissessið eftir komandi løgtingsval.

Fólkaflokkurin hevur ein greiðan tveyara í Óla Breckmenn, og ongan greiðan trýara. Men í hinum flokkunum er støðan meira gruggut. Formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, er ikki einans nummar tvey, men hann liggur við sínum 11 prosentum í tættari kapping við Alfred Olsen, sum fær 10 prosent av atkvøðunum í Sambandflokkinum. Fíggjarmálaráðharrin, Magni Laksáfoss, liggur nógv longri niðri og er eingin hóttan.

Í Javnaðarflokkinum stendur kappingin um næsta plássi millum Helenu Dam á Neystabø og John Johannesen. Til seinasta val fekk John Johannesen 19 atkvøður fleiri enn Helena Dam á Neystabø, men í hesari kanningini eru tey púra jøvn.

Innhýsis býtið í Tjóveldinum vísir sama mynstur. Her stendur kappingin um næsta plássi millum Torbjørn Jacobsen, sum fær 11 prosent, og Annitu á Fríðriksmørk, sum fær 10 prosent. Til seinasta val fekk Sjúrður Skaale fleiri atkvøður enn Annita á Fríðriksmørk, men í hesari kanningini blandar hann seg ikki í kappingina.

Men enn er ein heilur dagur til valið, og enn er – sum kendi Quistverturin plagar at siga – einki avgjørt.



*Fólkafloksmenn agitera fyri, at júst teir skulu veljast*